# Hava reist røktarheim til 24 fólk

**Í summar verður klárt hjá 24 eldri havnarfólkum at flyta inn í nýtt røktarheim**

**Eldrapolitikkur**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Í Tórshavnar Býráð eru tey ikki plágað av pátrúgv, tí hóast summi svørja upp á, at fríggjadagur er óeydnisdagur, varð nýggja røktarheimið í Havn reist fríggjadagin. Í september verður klárt hjá fólki at flyta inn*

Fríggjadagin var reisigildi í Havn.

Tað var Tórshavnar Býráð, sum helt reisigildi í nýggj røktarheiminum, sum verður bygt í Tjarnargarði, sum er gamla Marinustøðin í Havn.

Talan er um eitt røktarheim til 24 fólk. Tilsamans fer røktarheimið at kosta næstan 29 milliónir krónur, men tað er eisini alt gjørd rundanum við samanbinding út til Hoyvíkstjørn og Hoyvíksvegin.

Av hesum hevur Almanna- og heilsumálaráðið játtað at betala 12 milliónir og kommunan fíggjar hinar 17 milliónirnar

Arbeiðið hevur gingið skjótt. Heðin Mortensen, borgarstjóri, sigur, at arbeiðið byrjaði 16. januar í ár, og eftir ætlan skal bygningurin handast Tórshavnar Kommunu longu 10. juli. Síðani verður mett, at fyrstu búfólkini flyta inn fyrst í september í ár.

Við tað, at nýggja røktarheimið verður sambygt við Tjarnargarð, fer at gera tað bera til hjá báðum stovnunum at hava ymsar felags hentleikar og felags hjálpartól til ergo- og fysioterapi.

Tað er Selmar Nielsen, arkitektur, sum hevur staðið fyri projekteringini og byggileiðsluni og Búsetur er høvuðsarbeiðstakari.

**Heildarætlan Yviri við Strond**

Heðin Mortensen sigur, at næsta stóra takið hjá Tórshavnar Kommunu, verður heildarætlanin, sum ætlanin er at fara undir Yviri við Strond.

Har er ætlanin at gera røktarheim til 24 pláss. Men har er eisini ætlanin at gera eldraíbúðir og ellisheim til eldri fólk, sum eru so nøkunlunda sjálvbjargin.

Tann byggingin verður beint við Lágargarð, so ætlanin er eisini at hava ymsar hentleikar felags við Lagargarð.

Borgarstjórin væntar, at tey fyrst fara undir røktarheimið, tí har er tørvurin størstur.

Hann sigur, at fyrireikingarnar til hesa byggingina eru byrjaðar, men um tað eydnast at seta spakan í í ár, men tað verður tætt við.

FAROE
LAW
Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir
Tosið við:
Eyðfinn Jacobsen
advokat
Jens Wang
advokat
Tróndargøta 19
P.O.Box 158
FO-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo
www.faroe-law.fo
Sosialurin

# Føroysk matstova gav skarvin yvir

**Bæði Fríðrikkur, krúnprinsur og amerikanska heimsstjórnan, Snoop Dogg, hava dusað sær á matstovuni og barrini, sum føroyingr vóru við at seta á stovn. Men onki hjálpti**

**MATSTOVUYRKI**
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Tað byrjaði sum ein stórfingin ætlan við føroyskum áhugamálum í danska náttarlívinum, men onki hjálpti*

Tað var við bjørtum vónum, at føroyingar tveittu seg út í eitt matstovu-ævintýr í Keypmannahavn fyri einum sløkum ári síðani.

Eik Banki, sum tá æt Føroya Sparikassi, var við í fíggingini og gamli Hafnia maðurin, Martin Restorff, sat í nevndini, tá ið matstovan, Oil, vóru latin upp mitt í smørholinum í Keypmannahavn, á sjálvari Esplanaduni, beint við hjá A.P. Møller. Saman við matstovuni var eisini barrin, OPEC-Lounge upp.

Onnur, sum høvdu tilknýti til matstovuna, vóru ongin annar enn gamli Aqua maðurin, Rene Dif og Peter Bardenfleth-Hansen, sum er kendur í matstovuyrkinum í Danmark. Og í køkinum skuldi kendi kokkurin, Rida Berri, herska og regera.

Endamálið við matstovuni var greitt: Hon skuldi verða staðið í Keypmannahavn, har tað fínara slagið leitaði sær, tá ið tey skuldu í býin.

Tað gekk eisini væl í fyrstuni og matstovan fekk ikki færri enn fýra kokkahúgvur av fimm møguligum í donskum matstovuummæli.

Matstovan gjørdust eisini samtaluevnið eftir mtv-stevnuna í heyst, tá ið bæði Fríðrikkur krúnprinsur, amerikanska tónleikastjórnan, Snoop Dogg, dusaði sær í hølunum, sum vóru sermerkt við hvítum og svørtum innbúgvi av glasi, gróti og stáli.

Og ætlanin var eisini at brúka sama hugstkot á matstovum í Londin og París.

Men tað gekk ikki sum ætlað og nú, minni enn eitt ár eftir, at matstovan læt upp, er hon longu afturlatin.

Tað hevur vakt ans í Danmark, at hendan matstovan letur aftur.

Polikken skrivar um dagarnar, at nú hevur ein kanón í danska náttarlívinum, Torben Olsen, keypt matstovuna. Frammanundan eigur hann kend støð sum Café Ketchup og Café Victor og onnur støð av fínara slagnum.

Politiken skrivar, at tað var skjótt, at tekin fóru at síggjast um, at alt ikki ruggaði rætt, tí René Dif var skjótur at taka seg aftur.

Og í farnu viku fór matstovan í gjaldssteðg og sostatt endaði hetta føroyska ævintýrið í danska náttarlívinum.

Gravarhjálp
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net
Sosialurin 341800



Hús á Signabø
Hugnalig hús á Signabø í sera barnavinarligum umhvørvi til sølu.
Húsini eru í einari hædd à 135 m², grundøkið er 616 m², byggiár 2003.
**Húsini eru innrættað soleiðis:**
Køkur/stova, vásarúm, durur, wc, bað, 4 kømur og klædnarúm.
Boð undir 1,6 mió. kr. ongan áhuga.
**Tlf. 775038, 540852**
**ella t-post: btl63@kallnet.fo**